Santiago, 27. november 2010

Heilsan frá Jónu

Hesa vikuna havi eg umframt tað vanliga arbeiðið við OM luttikið í einum skeiði hjá YWAM um tann andaliga bardagan og frígerðing saman við einari aðrari gentu frá OM sum arbeiðir serliga við skøtjunum her í Santiago.

Tað sum hevur gjørt tað meira serligt er at ein transvestis/skøtja er komin við okkum hvørt kvøld til skeiðið. Hansara navn er Justo Andres, men hann brúkar bert sítt konufólkanavn sum er Glenda. Hann er opereraður soleiðis at hann rættuliga líkist einari kvinnu, og hevur tey seinastu nógvu árini arbeitt á gøtuni sum skøtja. Í gjøgnum tænastuna sum við hava her, har vit hvørja viku vitja skøtjurnar í fýra ymiskum gøtuhornum, eru vit komin at kenna hann fyri nøkrum árum síðan, og síðan er hann so komin at kenna Gud og hevur bjóðað Honum inn í sítt lív.

Hesa vikuna eru vit komin nógv tættari inn at hansara lívið og tað er heilt fantastiskt og ótrúðliga rørandi at síggja hvussu Gud veruliga arbeiðir í hansara lívi. Ein vinmaður hjá honum koyrir okkum til eina metro-støð hvørt kvøld av tí at vit eru ikki heima fyrr enn um miðnátt, so í bilinum fáa vit eisini havt góðar samtalur, áðrenn hann fer út á gøtuna at arbeiða alla náttina. Eitt kempu privilegium at síggja Gud virka í eina støðu sum í okkara eygum virkar so vónleys og í einum livi sum er so brotið og forlátið. Ein fantastisk náði og miskunn sum Gud hevur til okkum øll.

Orsøkin at eg deili hetta við tykkum er at Justo Andres tørvar allar tær bønir hann kann fáa. Hann er opin og ynskir at Gud setur hann frían og grøðir hann frá øllum tí sum heldur honum so bundnum. Hann er sera erligur og av tí at hann hvørki dugur at lesa ella skriva hjálpa vit honum við heima-arbeiði sum fylgir við skeiðnum og á tann hátt eru vit eisini komin at kenna hann betri.

Biðið at Gud setur hann frían frá øllum tí sum heldur honum trælabundnum, at hann kann síggja virðið sum Gud hevur sett í Hann; at hann kann elskað seg sjálvan sum tann mannin Gud hevur skapt hann at verða, og at hann ikki longur fer at selja sín kropp men kemur at skilja at Gud hevur eina fulkomna ætlan fyri hansara lív, og ynskir at brúka hann til at røkka onnur. Og biðið um visdóm til okkara.

Ótrúðliga spennandi at vera partur av øllum tí sum fer framm her, og eg læri nógv nýtt hvønn dag. Skjótt kemur bønarbrævið út sum greiðir eitt sindur meira frá tí sum eg geri dagliga og hvat er fari framm teir síðstu mánaðirnar.